Løgmaður um skuldsetingar frá Tórbirni Jacobsen:

# Sleppa ikki at standa ósvaraðar

**-Eg fari ikki at lata nakrar slíkar grovar skuldsetningar móti Fólkaflokkinum standa eftir í leysari luft. Avgjørt ikki av einum slíkum "fýri" sum Tórbjørn Jacobsen.**

SKULDSETINGAR
*Jan Müller*



*Anfinn Kallsberg, løgmaður fer tá hann kemur aftur til arbeiðis í Tinganesi í næstu viku at krevja svar frá Høgna Hoydal, um Tjóðveldisflokkurin stendur aftanfyri skuldsetingarnar hjá løgtingsmanni teirra í bløðunum.*

Í sera hvassorðaðum viðmerkingum í Sosialinum og Dimmalætting í gjár nærum húðflettir løgtingsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Tórbjørn Jacobsen fleiri at hægstu umboðunum hjá Fólkaflokkinum í landsstýrinum. Skrivingin kemur í kjalarvørrinum á tí orðaskifti, sum hevur verið um privatisering av landsfyritøkum, eitt nú Fiskavirking.

Einastaðni í greinini skrivar løgtingsmaðurin, sum í seinastuni eisini hevur verið nevndur sum vinnupolitiski framsøgumaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum, at: (vit endurgeva) "Ringt er at liva við einum løgmanni og einum fiskimálaráðharra, sum, orsaka av eini gloymdari fortíð, har, ið ilt var at skyna á mørkunum, ímillum eins egna og annara, ikki kundu sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi í heiminum." .

Víðari skrivar Tórbjørn Jacobsen, at tað verður ikki tolt at hava ein vinnumálaráðharra sitandi, sum gongur diamentralt ímóti samfelagsins og politisku áhugamálunum hjá størsta flokki í samgonguni. Hann skrivar víðari, at verður politikkurin hjá landsstýrinum ikki fylgdur, fær tað avleiðingar fyri mannin (Bjarna Djurholm, blaðm.) í Nesinum.

Sosialurin hevur biðið Anfinn Kallsberg, løgmann, sum er burturstæddur í summarfrí um eina viðmerking til sera kontantu og hvøssu úttalilsini hjá samgongufelaganum Tórbirni Jacobsen.

- Eg eri langt av landi skotin og kenni ikki alt innihaldið í greinini. Men tá eg komi heim skal eg nokk taka mær av málinum er fyrsta viðmerking hjá løgmanni. Hann ætlar sær nú at hyggja nærri at brævinum fyri at vita, um tað eru ymisk stig, sum skulu takast.

Løgmaður hevur frætt, hvat Tórbjørn Jacobsen hevur skrivað eitt nú henda setningin: "Ringt er at liva við einum løgmanni og einum fiskimálaráðharra, sum, orsaka av eini gloymdari fortíð, har, ið ilt var at skyna á mørkunum, ímillum eins egna og annara, ikki kundu sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi í heiminum." Hann sigur, at her er talan um so grovar skuldsetingar, at tær sleppa ikki at standa ósvaraðar.

Anfinn Kallsberg vísir á, at Tórbjørn Jacobsen hevur verið við til at gera eina samgonguavtalu, og er tað so, at hann irðir seg um tað, stendur honum frítt at broyta støðu. Um hetta fer at fáa avleiðingar fyri samgonguna veit løgmaður enn ikki.

- Eg veit ikki, um eg skal taka nakað alvorligt, sum Tórbjørn Jacobsen sigur ella skrivar. Hetta verður upp til Tjóðveldisflokkin at finna út av. Um hetta skal skiljast sum um, at flokkurin angrar, at hann er farin í samgongu, og hetta skal koma út sum lesarabrøv í bløðunum heldur enn at tosa um tað í landsstýrinum, tað er so ein máti at gera tað uppá, sum Tjóðveldisflokkurin so hevur valt.

- Men tað hevur ikki verið óvanligt, tá Fólkaflokkurin hevur sitið í Tinganesi, at Óli Breckmann hevur skrivað og leikað í ímóti sínum samgongufelagnum í Dagblaðnum!

- Tað er rætt.

- Men hevur Tórbjørn Jaoobsen tá ikki fullan rætt til at siga sína hjartans meining í bløðunum, uttan at tað skal fáa nakra avleiðing fyri samgonguna?

- Lat okkum nú síggja, hvat liggur í orðunum hjá honum.

Løgmaður sigur, at tað er sera týdningarmikið fyri seg at vita, um hetta er nakað, sum Tjóðveldisflokkurin stendur aftanfyri.

– Er tað bara Tórbjørn Jacobsen, sum stendur aftanfyri tað, so veit eg tað. Tí hann havi eg kent frá einum samgongusamarbeiði, sum hann noyddist at fara burtur úr.

- Men um so er, at hetta er ikki flokkurin men bara Tórbjørn Jacobsen, kanst tú so kortini liva við tí hann skrivar um teg og fiskimálaráðharran?

- Tórbjørn Jacobsen er ikki til at stýra. Tað veit ein og hvør.

Løgmaður sigur víðari, at hevur sitandi samgonga ikki uppbakking í løgtinginum aftanfyri seg, so er hann ikki løgmaður ein tíma aftaná.

Anfinn Kallsberg sigur, at úttalilsini hjá løgtingsmanninum eru so mikið grov, at hann fer at kanna tey, tá hann kemur heimaftur.

- Tórbjørn Jaoobensen veit væl, at tað eru ikki meira enn tvær vikur síðani, at vit viðgjørdu vinnupolitikk í landsstýrinum. Tá hevði Tjóðveldisflokkurin onga støðu og hevur flokkurin heldur ikki givið Fólkaflokkinum nakra støðutakan. Er tað so, at politikkurin hjá Tjóðveldisflokkinum skal koma til sjóndar í lesarabrøvum sum útspilling av nøkrum landsstýrismonnum, so er tað væl ein mannagongd, sum flokkurin hevur valt at brúka, og tað vil eg fegin hava eitt svar uppá frá Tjóðveldisflokkinum – og ikki frá Tórbirni Jacobsen, tí hann havi eg einki samskifti við um vinnupolitikk.

- Men er tað nokk fyri teg, um Tjóðveldisflokkurin í hesum førinum tekur avstand frá tí, sum Tórbjørn Jacobsen hevur skrivað?

- Eg fari ikki at lata nakrar slíkar grovar skuldsetningar móti Fólkaflokkinum standa eftir í leysari luft. Avgjørt ikki av einum slíkum "fýri" sum Tórbjørn Jacobsen.

## Vinnarar av stuðulssvimjingini hjá Svimjisambandi Føroya 2002

Drigið er millum stuðlarnar ið hava stuðla til stuðulsvimjingina hjá Svimjisambandi Føroya, og eru vinnarirnir hesir:

| Vinningur nr: | Vinnari: |
|---|---|
| 1. GSM Nokia 3330 við teletíðarhaldi | Hansina Ludvíg, FO 826-Trongisvágur |
| 2. GSM Nokia 3330 við teletíðarhaldi | Ása Garðshamar, FO 850-Hvalba |
| 3. Vikuskiftisferð til Danmarkar fyri 1 | Fríðbjørg Olsen, Kráarvegur 50, FO-160 Argir |
| 4. 500 litrar olja frá Føroya Shell | Niclas Davidsen, FO-650 Toftir |
| 5. 500 litrar olja frá Statoil | Jógvan Ryggshamar, Grønatúgva 58, FO-530 Fuglafjørður |
| 6. Gávukort á 500,- kr frá F.K. | Mannbjørn Mortensen, Undir Svartafossi 4, FO-100 Tórshavn |
| 7. Gávukort á 500,- kr frá Samkeyp | Marjun á Fløtti, Støðlagøta 12, FO-160 Argir |
| 8. Gávukort á 500,- kr frá Elding | Hildur Arge, Berjabrekka 165, FO-100 Tórshavn |
| 9. Gávukort á 500,- kr | Súsanna Eikholm, FO-430 Hvalvík |
| 10. Gávukort á 500,- kr | Thilda Joensen, FO-900 Vágur |

Vinningarnir verða latnir vinnarunum mótvegis kvittan fyri at hava goldið stuðulin.
Kvittanin skal sendast til Svimjisamband Føroya, Postbox 1329, FO-110 Tórshavn

**Svimjisamband Føroya**

## Tøkk

Løgmanni, landsstýri og starvsfólki í Tinganesi og tykkum mongu, sum heiðraðu okkum á hátíðarhaldinum í Tinganesi 26. juni, í samband við at eg fór úr starvi sum umboðsmaður Føroya í Bretlandi 30. juni, eftir tænastu á umboðsstovuni í 54 ár, takki eg hjartaliga. Ein sertøkk fyri tær vøkru gávur og blómur og heilsanir frá tykkum, sum ikki kundu luttaka. Tað er gleðiligt at síggja tey framstig í oyggjalandi okkara hesi árini og er ynski mítt, at Harrin vil veita landi og fólki okkara góðan byr framyvir.

Við tøkk og heilsan frá

**Nessie og Sofus Poulsen**
**Aberdeen**



# Mæla til sama dagatal

**Fiskidaganevndin handaði í gjár landsstýrismanninum við fiskivinnumálum tilmæli sítt um fiskidagar komandi fiskiár. Nevndin mælir til sama dagatal, sum seinasta fiskiár**

FISKIDAGAR
*Edvard Joensen*



*Jørgen Niclasen hevur fingið handað fiskidagatilmælið, sum hann hevur sett seg at lesa*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sama fiskidagatal og allan flotan í skipanina, er tað, Fiskidaganevndin hevur mælt landstýrismanninum við fiskivinnumálum til í tilmæli sínum til komandi fiskiár.

Óli Samró, nevndarformaður, handaði fyrrapartin í gjár landsstýismanninum tilmælið. Landsstýrismaðurin hevði frammanundan fingið eitt tilmæli frá Fiskirannsóknarstovuni. Tað tilmæli- er nógv meira restruktivt, enn hetta seinna er. Har verður mælt til at lækka fiskidagarnar so líðandi við meira enn einum triðingi.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, segði, at hann nú fer at gera sínar metingar við báðum tilmælunum sum grundarlagi, fyri síðan at kunngera, hvussu verður kjomandi ár.

Hann ásannaði, at langt er millum tilmælini, men fegnaðist tó um, at tað í báðum tilmælunum verður nevnt, at fiskastovnarnir í løtuni eru væl fyri.

Í verandi fiskidagaskipan eru lemmatrolarar og garnaskip undantikin. Men fiskidaganevndin var samd um at mæla til, at allir skipabólkar, eisini áður nevndu, koma upp í skipanina, og tað helt landsstýrismaðurin vera áhugavert.

# Hava einki í móti aliringinum

**Heimasandsfólk hava einki í móti, at ein aliringur liggur á vágni. Heldur er tað hinvegin, at tey heilsa honum vælkomnum, sigur borgarstjórin á Sandi**

ALILOYVI
*Edvard Joensen*

Heimasandsfólk óttast ikki, at ein aliringur við lívfiski liggur á Sandsvág. Heldur ynskja tey honum vælkomnum, sigur Tórur Johannesen, borgarstjóri.

Tað eru komin mótmæli í móti, at partafelagið Fútaklettur hevur lagt ein alিring á Sandavág. Tey, sum mótmæla, hava ført fram, at tað fer at skaða umhvørvið á Sandi. Vágna, Sandsvatn og sandin við kendu Mølheyggjunum. Eins og tey ótast fyri, at sjúka møguliga kann fara at gera um seg á økinum.

Eisini verður ført fram, at har, laksaaling er komin, eru tey síl, sum frammanundan hava verið, horvin.

Og júst hendan grundgevingin hevur vigað tungt hjá teimum, sum mótmælt hava alingini á Sandsvág.

Hinvegin hava heimasandsfólk einki petti í móti, at ein aliringur liggur á vágni, sigur Tórur Johannesen, borgarstjóri á Sandi. Heldur er tað so, at tey halda tað vera í lagi.

– Tað eru bara »sóvri«, sum ganga og hugna sær kring Vatnið og sita á einum ølkassa á sandinum og sletta við eini dýrari tráðu, sum mótmæla hesum, var ein reaktión, Sosialurin fekk av Sandi.

Sands Kommuna hevur viðmælt, at ringurin verður lagdur, sigur borgarstjórin. Og kommunan hevur eisini givið Fútakletti eitt fyribilsloyvi at gera eina lívfiskastøð uppi á landi.

Ætlanin var at leggja hana á havnarlagnum Úti í Støð. Men tí vísti kommunan aftur og gav loyvi at byggja hana á ídnaðarøkinum norðan fyri havnarlagið.

Inntak og útlát skulu bæði verða vestureftir, soleiðis at einki samband er millum støðina og havnarlagið yvirhøvur, sigur Tórur Johannesen.

Hann óttast ikki fyri, at útlátið, sum verður veitt vestur um, fer at skaða urðina niðan fyri Gróthúsvatn ella vatnið sjálvt. Tí frárenslið liggur nógv longri suðuri enn so, sigur hann. Kanksa ein heilan kilometur frá urðini.

Ingibjørn Eldevig, sýslumaður á Sandi, sum er formaður í friðingarnevndini fyri Sandoyar Sýslu, sigur, at til teirra er eingin áheitan ella fyrispurningur komin yvirhøvur. Hann visti einki um aliringin, fyrr enn hann sá hann á vágni.

Sjálvur er hann ikki heilt greiður yvir, um tað er rætt at leggja ein ring soleiðis, uttan at hava spurt lokala friðingarmyndugleikan fyrst. Hann kannar í løtuni tann spurningin, sigur hann.

Heldur ikki hann sigur seg hava frætt nakað sum helst um, at heimasandsfólk eru ímóti, at ringurin er lagdur har.

Tórur Johanensen, borgarstjóri, sigur hinvegin, at á sjónum hevur hvørki kommuna ella friðingarnevnd nakran ræðisrætt. Tað er Vinnumálaráðið einsamalt, sum ræður har, sigur hann.

Ført hevur verið fram, at tað kann fara at ávirka grindarakstur á Sandsvág, at ein aliringur liggur á vágni.

Til tað sigur sýslumaðurin, at tað kann hugsast, uttan at hann tó vil siga nakað víst. Men hann ásannar, at ringurin liggur í linjuni, sum hann tekur til.

Men borgarstjórin óttast ikki fyri tí, tí vágin er sera víð, og gott pláss skuldi verið at rikið báðu megin ringin, heldur hann.



*Heimasandsfólk óttast ikki aliringin á Sandsvág. Hvørki sýslumaðurin ella borgarstjórin siga seg hava hoyrt eitt øvugt orð um ringin*